# nstøður á Selatrað



**AKTIVITETIR**

*Selatraður er ein vøkur náttúruperla við góðum umstøðum til ymiskar aktivitetir, bæði á landi og á sjónum*

Mynd: Birgir W. Høgnesen

føroyingum til bygdar, har høvi verður hjá fólki at royna ymisku aktivitetirnar, sum eru á staðnum.

– Vit skipaðu eisini fyri eini slíkari summarlegu í fjør, og tá høvdu vit heili 1000 vitjandi á Selatrað í tilsamans fimm dagar. Í miðal vóru eini 500 fólk inni á deplinum í senn, og tilsamans 100 leiðarar vóru knýttir at tiltakinum.

Magni Laksáfoss sigur, at ætlanin var ikki at skipa fyri einum so stórum tiltaki aftur í ár, men heldur at taka tiltakið uppaftur næsta summar.

– Men vit hava fingið so nógvar áheitanir frá fólki, at vit hava gjørt av at skipa fyri tiltakinum aftur í ár.

Hann sigur, at tiltakið í ár verður í somu viku og sama vikuskiftið í august, sum regattasigling verður av Eiði til Hósvíkar – og soleiðis eisini sama vikuskifti, sum ovastevna er í Nólsoy. Tiltakið kemur at vara frá hósdegi til sunnudag.

– Vit høvdu einar 25 ymiskar aktivitetir í fjør, sum fólk kundu luttaka í, og fólk vóru sera positiv, sigur Magni Laksáfoss, skótaovast hjá KFUM-skótunum í Føroyum.

vilmund@sosialurin.fo



*– Vit virðismeta, at skótarnir gera eitt ógvuliga gott og sjálvboðið arbeiði. Tí lata vit Skótadepilin sleppa inn á smoltstøðina á Selatrað við nøkrum av sínum aktivitetum, sigur Regin Jacobsen, stjóri í Bakkafrosti*

# Tvær gentur fingu skaða

**Øll fýra fólkini í vørubilinum, sum rendi á ein steyra á Nesi mánadagin, vórðu flutt á Landsjúkrahúsið til kanningar**

Randi Jacobsen

Ein maður í vørubili vildi fegin hjálpa trimum ellivu ára gomlum gentum og tók tær upp í bilin.

Ein genta sat framman og hinar afturi í kassanum.

Av eini ella aðrari orsøk rendi maðurin á ein el-streyra beint við gamla prestagarðin á Nesi. Hetta var umleið klokkan 16 mánadagin.

Bilførarin fekk ein ordans hvøkk av óhappinum.

Genturnar, sum vóru afturi í bilinum, fingu skaða í andlitið, helst tí tær ikki sótu íbundnar.

Øll fýra fólkini vorðu send á Landssjúkrahusið til kanningar.

randi@sosialurin.fo

# Stovna borðtennisfelag á Toftum

**Borðtennisborðini í nýggja skúlanum á Toftum hava egggjað ungum fólkum til at stovna nýtt borðtennisfelag**

Randi Jacobsen

Borðtennisfelagið á Toftum hevur ligið stilt í fleiri ár, men nú livnar tað uppaftur.

16. juni verður stovnandi fundur av nýggjum borðtennisfelag.

Nýggi stóri skúlin á Toftum hevur stóra fimleikarhøll, og har eru eisini nøkur borðtennisborð, sum hava verið dúgliga nýtt.

Tríggir ungir toftadreingir veru so fermir, at teir hildu seg framat og teknaðu seg sum einstaklingar til FM-kappinina i vár.

So væl skarst, at ein teirra gjørdist føroyameistari. Tað gjørdi hann, sjálvt um hann ikki hevði vant í nøkrum felag.

Kommunustýrið á Toftum samtyktu mánakvøldið at lata nýggja felagið fáa tímar í fimleikarhøllini, og kommunustýrið er eisini sinnað at keypa nøkur borð aftrat.

randi@sosialurin.fo

# Kampingpláss á Toftum í summar

Randi Jacobsen

Tá ið bátastevnan var á Toftum, varð gjørt eitt fyribils kampingláss á økinum millum kommunuskrivstovuna og Føroya Banka.

Har vóru allar neyðugar veitingar við vatni, kloann og vesi.

Plássið riggaði so væl, at kampingfelagið hevur heitt á nes kommunu um at lata kampingplássið vera opið í summar.

– Vit fara nú at rigga plássið til, so kampingvognar kunnu standa har, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu.

Hetta varð samtykt á almenna kunnustýrisfundinum mánakvøldið.